Sosialráðgevi til Almannastovuna

Søkt verður eftir sosialráðgeva til Almannastovuna at arbeiða innan brekøki.

Arbeiðið fevnir um ráðgeva og vegleiða vaksnum og børnum við skerdum likamligum og/ella sálarligum førleika og familjum teirra.

Arbeiðsuppgávurnar eru millum annað:

- veita persónliga ráðgeving og vegleiðing
- verða ráðgevi í mun til samlaðu viðgerðarætlanina hjá viðskiftafólkunum
- fyrireika og viðgerða umsóknir um stuðul eftir almannalóggávuni
- samskipa og ráðgeva í mun til stuðulsfólkaskipanir
- samstarva við aðrar fakbólkar og myndugleikar
- samstarva við aðrar deildir á Almannastovuni

Søkt verður eftir persóni, sum hevur:

- Sosialráðgevaraútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
- evni at seta í verk fyriskipanir
- góð samstarvsevnir
- evnir at arbeiða tvørfakligt
- evnir at hava professionelt og persónligt samband við viðskiftafólk
- evni at arbeiða í heildarloysnum
- góð evni at orða seg bæði munnliga og skrivliga
- kunnleika til EDV

Lønar- og setanarviðurskifti:
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Starvið hevur tilvísing til fakliga leiðaran. Viðmerkjast skal, at Almannastovan er í gongd við bygnaðarbroytingar, so ávísar tillagingar skulu væntast. Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Karin á Heygum, fakligan leiðara, á tlf. 315480 millum kl. 09.00 og 13.00 gerandisdagar, tó ikki mikudag.

Umsókn við avriti av prógvum og øðrum skal sendast til:

Almannastovan
Postsmoga 3096
110 Tórshavn

Umsóknarfreist: 28. mars 2002

Vinarliga merkið brævbjálvan: »Sosialráðgevi brek«

Mentamálastýrið
Mentamáladeildin

Umsóknir um stuðul frá norðurlendsku bókmenta- og bókasavnsnevndini til týðing av bókmentum hjá grannalondum, týðingarstudning og fólkbókasavnssamstarv

Boðað verður við hesum frá, at vegleiðingarbløð og umsóknarbløð til stuðul frá norðurlendsku bókmenta- og bókasavnsnevndini (NORDBOK) til týðing av bókmentum hjá grannalondum o.ø. fáast við at venda sær til Mentamálastýrið. Freistin at søkja er **1. apríl 2002**.

Gjørt verður vart við, at allar umsóknir hesum viðvíkjandi skulu sendast skrivstovuni hjá NORDBOK og skulu sostatt stílast:

NORDBOK
c/o Biblioteksstyrelsen
Nyhavn 31 E
DK-1051 København K

Umsóknarbløð eru eisini at finna á heimasíðuni hjá NORDBOK: www.bs.dk/nordbok/

Í framtíðini verður ikki lýst við omanfyri standandi, men bert á heimasíðuni hjá Nordbok. Tó hava møguligir umsøkjarir møguleika fyri at móttaka ein teldupost, har kunnað verður um umsóknarfreistir v.m., og kunnu hesir melda seg til eitt teldupostyvirlit við at senda teldupost til Ingelise Dyrlund, idp@bs.dk

Mentamálastýrið
Postrúm 3279 • 110 Tórshavn

www.sosialurin.fo

Frá Happadráttinum

Seinast søludagur til 2. drátt er hósdagin 21. mars

Størstu vinningar hesaferð:

1x	60.000 kr.
1x	30.000 kr.
1x	25.000 kr.
1x	15.000 kr.
5x	10.000 kr.
10x	5.000 kr.

70 % *av søluvirðinum verður latið til vinningar*

Hin Føroyski Happadráttinum

Útbjóðing

Í samband við bygging av nýggjum barnagarði og vøggustovu í Sandavági verður:

BETONGARBEIÐIÐ

hervið boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið snýr seg í høvuðsheitum um stoyping av kjallara og sokkuli, samanlagt uml. 68 m^3.

Útbjóðingartilfarið fæst frá Kommunuskrivstovuni í Sandavági, móti at flyta kr. 1.000,- á konto í Føroya Banka nr. 6460 – 2200556 ella í Føroya Sparikassa 9181 – 1850018.

Tilboð í afturlatnum brævbjálva merktur »Barnagarður og vøggustova: Betongarbeiði« skulu verða Kommunuskrivstovuni í Sandavági í hendi seinast týsdagin hin 26. mars 2002 kl. 15.00.

Lisitatiónin verður sama dag kl. 15.30, har teir bjóðandi hava møguleika fyri at verða hjástaddir.

Sandavágs kommuna
Tlf. 332470 · Fax 333470
t-postur: sandavagur@sandavagur.fo

Heimarøktin í Vágum

Heilsuhjálpari

Søkt verður eftir heimahjálpara at arbeiða í Vágum 25 tímar um vikuna, í tíðini 01. apríl til 01. november 2002 .

Ynskiligt er at viðkomandi hevur útbúgving sum heilsuhjálpari ella hevur kunnleika og royndir innan eldrarøkt.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Heilsuhjálparafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Um tú ynskir at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja á økisskrivstovuna tlf. 333249

Skrivlig umsókn verður at senda til:

Heimarøktin øki 2
Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur

Umsóknarfreist 27.03.2002

KUNNGERÐ

Frá útskiftingarnevndini fyri Kunoyar bygd

Útskiftingarfundur verður í Kunoy hósdagin 21. mars kl. 11.

Endaligur planur fyri býtið uttangarðs verður framlagdur.

Eigaralistar, uppploysn av felagslutum og samanlegging av eigindómum verða framlagdir.

N. v.
Øssur A. Midjord
útsk. form.

Sosialurin

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

OPEL KADETT
1200 S sera bíliga til søluo.
Tlf. 448196

TIL SØLU
Honda Accord 1.8i, árg. 98, koyrt 57000 km, prísur 130.000. Kann sígjgjast á bil.fo
Tlf. 448121

NISSAN KINGCAB
árg. 96, km 70.000, í góðum standi til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 216600

LASTBILUR TIL SØLU
Lastbilur 4 x 2 til sølu. Volvo uml. 20 ára gamal við 3-vegis vippu og krana, 3 t/m. Eykalutir fylgja við. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 216600

FORD BRONCO
'74, 4 x 4 (jeepur) til sølu. Skal samlast.
Tlf. 321584

TILBOÐ
Proton 420 Turbo diesel, nýggjur, 5 hurðar, kr. 129.800,-
P/F Autoimport, tlf. 218778

TIL SØLU
Eykalutir til BMW 318 TDS árg. 96.
Tlf. 218778

FELGUR TIL SØLU
Fýra felgur, ongantíð brúktar, passa til Nissan Almera , til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 333574 ella 260074

OPEL ASCONA
Bláur Opel Ascona til sølu sum eykalutur, árg. 87.
Tlf. 252191

VØRUVOGNUR
Lítil vøruvognur árg. 88 bíliga til sølu.
Tel. 213046

TOYOTA CARINA 1.6
st.car, hevur koyrt 155.000, er sera væl viðfarin og er í sera góðum standi. Selist nýsýnaður, árg. 90.
Tlf. 220564 ella 447221

HEVUR NAKAR
ein kølara til ein Mazda 929 st.car. árg. 88 at selja mær.
Ring 373169 ella 250213

OPEL VECTRA
árg. 12/88, er í góðum standi, men krevur ábøtur. Sýnaður 1.3.2002 til sølu.
Tlf. 313790 ella 220405

VW-TRANSPORTARI
árg. 92, hvítur 2400 diesel, til sølu. Koyrt 153.000 km.
Tlf. 211770 ella 283868

KØLI- FRYSTIVOGNAR
til sølu. MAN 19-322 2 aksl. MAN 22-370 3 aksl.
Tlf. 222774

YNSKIST TIL KEYPS
Høgra lykt framman til Citroen ZX, ynskist til keyps.
Tlf. 332830 eftir kl. 18

TIL SØLU
Ymisk nýggj dekk til persón og vørubílar bíliga til sølu.
Tlf. 217778 ella 218778

FORD ESCORT 1.3
árg. 86, í góðum standi, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 253021

BRÚKT DEKK TIL SØLU
Fýra píkadekk við felgum stødd 165/13 200 kr. stk. Fýra summardekk u/ felgur stødd 165/13 150 kr. stk. Eitt summardekk 155/13 v/ felgu 100 kr.
Ring á 443328 ella 260249

HURÐAR
til Audi 80, árg. 86-91 og til VW Golf II, árg. 84-91 og Nissan Patrol, árg. 84-92.
Tlf. 217778 ella 218778

YNSKIST TIL KEYPS
Volvo 340 DL við fronskum motori.
Tlf. 424270 - 286504

NISSAN PATROL
árg. 96, koyrt 162.000 km, til sølu. Prísuppskot 150.000 kr. Kann sígjgjast hjá Super Dekk.
Tlf. 227989

KASSAVOGNUR
v/ lyft til sølu. VW LT. 35, árg. 92. (Lítla koyrikortið).
Tlf. 222774

PERSÓNVOGNUR TIL SØLU
Nissan Sunny, 4 hurðar, sedan, árg. 89, í góðum standi.
Tlf. 222774

TIL SØLU
Brotin motorblokkur við nýggjum krumtaksaksli og nýggjum leigum, til VW Golf, árg. 92, TD 19, bíliga til sølu.
Tlf. 375186

DEKK TIL SØLU
4 aummardekk stødd 205/65-15 bíliga til sølu.
Tlf. 211990

VW PASSAT TDI
árg. 98, 110 HK, Trendline, koyrt 97.000 km til sølu.
Tlf. 421415 ella 261123

DAIHATSU CHARADE G100
Sýnaður 3/02, ongan kross, í góðum standi, árg. 89, km 120.000. Til sølu um hóskandi boð fæst, møguliga brúktur bílur kann ganga inn í keypið.
Tlf. 228347

MAZDA 626
til sølu. Hevur el-rútar, centrallás við fjarstýring, sleipikrók og er sýnaður í mai 2001. Krevur smáar ábøtur. Bilurin er árg. 87, til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 227112

CITROËN XANTIA HDI
árg. 99 til sølu um hóskandi boð fæst. Ring og hoyr nærri á
tlf. 423341 eftir kl. 16, Jónsvein

SUMMARDEKK
Fýra lítið brúkt summardekk á felgum 165/70 R14 til sølu.
Tlf. 228189

BILUR
til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 224666, e. kl. 15

TOYOTA COROLLA
árg. 87, til sølu.
Tlf. 314465 / 253443

TIL SØLU
Mitsubishi Lancer, diesel, árg. 87, við píkadekkum, bíliga til sølu.
Tlf. 421451 / 253478

OPEL ASTRA 1.7
turbo diesel, árg. 97, til sølu. Koyrt 127.000 km, hevur el-spegl v/ hita, cd-spælara, 15" sportsfelgur og píkadekk við felgum, hevur vel, sær gott út og er væl hildin.
Tlf. 255467

Amboð

STILLADS
15 metur í einari hædd.
Tlf. 210856

AMBOÐ

· Tvangsblandarir
· Blandimaskinur
· Glittemaskinur
· Bjálkavibrator
· Stavivibrator
· Betongslípimaskinur

og mangt annað

Søla & útleigan

Kaj Andreasen & Co
Tel. 315600 - Fax 318608

TIL SØLU
Gravimaskina til sølu – Bobcat 1.5 t. – koyrt uml. 4500 tímar. Í góðum standi, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 216600

HITABLÁSARI TIL SØLU
Kroll hitablásari til verkstað, brennur diesel ella spillolju og ein oljutangi 1200 l.
Tlf. 217778 ella 218778

SPROYTUKABINA
Blowtherm EF750 l. 7,50 x b. 3,96 x h. 2,70 til sølu um hóskandi boð fæst. Umframt ein Car-O-Liner upprættarabonkur.
Tlf. 217778 ella 218778

TIL SØLU
Bil lyfta til sølu. Væl egna til garagu. Lyftir uml. 1 metur.
Tlf. 211990

TVANGSBLANDARI
300 litrar (1 sekk) ynskist til keyps.
Tlf. 253103 ella 217790

Arbeiði

ARBEIÐI YNSKIST
17 ára gomul genta søkir arbeiði eftir skúlatíð. Alt hevur áhuga.
Tlf. 253321

ARBEIÐI YNSKIST
Tvær gentur 14 og 15 ár søkja arbeiði aftan á skúlatíð í Havn.
Ring tel. 257879

YMIST FYRIFALLANDI
arbeiði verður gjørt av tilkomnum manni, ið er hondverkari.
Tlf. 310352

ARBEIÐ YNSKIST
19 ára gomul genta ynskir arbeiði skjótast gjørligt. Helst við børnum ella handilsarbeiði. Tit kunnu ringja á
Tlf. 316975 ella 252638

ARBEIÐI SØKIST
Eg eri 16 ára gomul genta, ið søki arbeiði eftir skúlatíð. Alt hevur áhuga.
Tlf. 315137, spyr eftir Sáru

Barnaansing

ÁLÍTANDI GENTA/KONA
søkist at ansa 2 børnum skjótast gjørligt. Ring á
tlf. 310431 ella 261435 e. kl. 18

HEY!
Manglar tú onkran at passa børnini hjá tær, ert tú vælkomin at ringja til mín – eg eri búsitandi í Lamba.
Tlf. 260202

VÁGUR: UNG PIGE
søges til dansk familie med 3 børn – 6, 5 og 3 ár. Løn, kost og logi, godt værelse og gode arbejdsforhold.
Tlf. 373023

Barnaútgerð

TIL SØLU
Tremmusong við madrassu bíliga til sølu.
Tlf. 447451

BARNAVOGNUR TIL SØLU
Myrkabláur Simo barnavognur við regnslag og fluguneti til sølu fyri kr. 2.500. Bert brúktur til 1 barn.
Tlf. 319859

GRÁUR SCANDIA
barnakoyristólur til sølu fyri 900,- kr.
Tlf. 319897, eftir kl. 18

TVÍBURAVOGNUR YNSKIST
Tvíburavognur ynskist til keyps nú ella í apríl/mai.
Tel. 321242 eftir kl. 17

SIMO BARNAVOGNUR
Bláur Simo barnavognur árg. nov. 2000, við lufthjólum, regnslag, selum og fluguneti. Nýprísur 5.800 kr. til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 222841

TIL SØLU
Vælhildin, myrkabláur 1 ára gamal koyristólur við regnslag til sølu.
Tlf. 319655 ella 258500

TIL SØLU
Marinblá babylyft, baby skrástólur og beriseli, bíliga til sølu.
Tlf. 317564

TIL SØLU
Scandia barnastólur, gráur, 900 krónur. Puslipúta er við í keypinum.
Tlf. 319897, e. kl. 18

TIL SØLU
Vælhildin 1 ára gamal BRIO barnavognur og vælhildin BRIO koyristólur til sølu.
Tlf 310801/222127

Bátaútgerð

TIL SØLU
6-mannafarið »Jarnbardur« úr Havn, ið var bygdur av Hanusi Jensen 1990, verður lýstur til sølu um nóg høgt boð fæst. Báturin hevur m.a. 6 FM-heiti. Mynd á www.KRF.fo. Møguleiki er eisini at keypa 8-mannafarið »Knørrur«. Hoyr nærri á 310055/250118 ella skriva til
jannie_d@hotmail.com

YNSKIST TIL KEYPS
10-mannafar ella størri við veiðuloyvi, ynskist til keyps.
Tlf. 251492

KAPPRÓDRARBÁTURIN
Lómur, 6 mannafar til sølu.
Argja Róðrarfelag, tlf. 214159 ella 219981

TIL SØLU
Glastrevjabátur, bygdur í Bø, útgjørdur til línu- og snelluveiðu, við nautiskari útgerð, til sølu um hóskandi boð fæst. Fiskiloyvi.
Tlf. 214406

Bingo

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði, hóskvøldið 14. mars kl. 19.30.
Eldrafelagið Borgin

GOTT BINGO
verður á Suðuroyar Ellis- & Røktarheimi mánadagin 18/3-02 kl. 19.00.
Veitslunevndin

FRÁ EYDNUNI
Gott páskabingo verður sunnudagin 17.3. kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Eykaspælið 800 kr. Høvuðsvinningur á lutaseðli 1500 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

GOTT PÁSKABINGO
verður í Pálsstovu sunnudagin 17. mars kl. 16. Á lutaseðli 2 stór, føroysk páskaregg og 3 x 1000 kr. Bingola og eyka spæl. Koyring heim.
Kíwaniskluburin Rósan

BINGO
verður í VB-húsinum tórsdagin 21. mars kl. 19.30.
Vágs Bóltfelag

BINGO
verður í TB-húsinum tórsdagin 14. mars kl. 19.00. Høvuðsvinningur 2x500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Páskaegg til rekkju. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

KØKUTOMBOLA Í SMS
Amnesty International hevur køkutombola á torginum í SMS fríggjadagin 15. mars og leygardagin 16. mars. Tiltakið byrjar kl. 10.00 báðar dagarnar og er opið til handlarnir steingja.
Amnesty International

GOTT PÁSKABINGO
Verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 16. mars kl. 16. 12 plátur 100 kr. Full pláta 300 kr. Drigið verður millum spølini. 15 vinningar á lutaseðli. Høvusvinningur á lutaseðli eitt gávukort á 1000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

TIL SØLU
Ein rúgva av barnabókum bíliga til sølu.
Tlf. 317810 ella 217810

Burturm. /funnið

FARTELEFON BURTURMIST
Ein svørt Nokia 3330, burturmist í Havn.
Vinarliga ringið 310795 ella 218842

FARTELEFON
burturmist í Runavík ella Tórshavn – Ericsson T-18 S. Um nakar hevur funnið hana, vinarliga
ring 259148 ella 224795

Býli

TIL SØLU
Hús í Vági til sølu.
Tlf. 224338

KAMAR YNSKIST
til leigu í Havn skjótast gjørligt. Farið væl um gjaldi til tiðina.
Tlf. 255010

ÍBÚÐ YNSKIST
Maður fyrst í 30'unum søkir rúmliga íbúð í Havn. Havi gott fast arbeiði og gjaldi til tiðina.
Vinarliga ring 261659

SAKNAR NAKAR
onkran at búgva saman við? Vit eru 3 damur, sum fegin vilja hava eina gentu/damu, um 25-35 ára gomul, at leiga saman við okkum. Vit hava fingið eini hús, so um hettar hevur tín áhuga, so ring á
tlf. 226750

ÍBÚÐ Í KBH.
fult møblerað, stórur altanur, elevator, vaskikjallari o.a. til framleigu í 6-8 mðr. ella eftir avtalu. 4.300 við ljós og hita. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 373169 ella 250213

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……..

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki